## Kristian Magnussen um fólkapensjónina:

# Geva við einari hond, taka við hinari

**Ein av tingmonnum Javnaðarfloksins, Kristian Magnussen, fegnast um, at pensjónistarnir eftir ætlan fáa meira pening millum hendurnar, men heldur landsstýrið tekur við aðrari hondini, tá ið grundupphæddin ikki verður prístalsregulerað**

PENSJÓNIR
*Heri á Rógvi*

Á tíðindafundi týsmorgunin kunngjørdi landsstýrið, hvøjar broytingar landsstýrið ætlar at gera í sambandi við fólkapensjónina. Landsstýrið ætlar at broyta tað soleiðis, at allir pensjónistar fara at fáa eina hækkan í pensjónini.

Kristian Magnussen, tingmaður fyri Javnaðarflokkin, sigur seg fegnast um, at pensjónistarnir nú fara at merkja ein bata. Hann heldur tað tó vera okkurt at fílast á í hesum sambandinum.

–Landsstýrið hevur havt ríkiligt av tíð til hetta, og tað kann tykjast ógvuliga løgið, at teir nú knappliga koma fram við hesum so skjótt undan komandi løgtingsvali, sigur Kristian Magnussen.

Tað, sum Kristan Magnussen serliga heldur kundi verið gjørt betur, er, at grundupphæddin átti at verði prístalsregulerað.

–Á henda hátt, høvdu pensjónistarnir fingið munandi meira í fólkapensjón, enn teir fáa við hesari nýggju ætlanini hjá landsstýrinum, sigur Krisian Magnussen.

Sambært uppskotinum hjá landsstýrinum fáa pensjónistar, sum eru og giftir og einki annað forvinna uttan fólkapensjónina, 4.519 krónur meira í pensjón um árið enn áður. Kristian Magnussen sigur, at hevði prístalsregulering verið, hevði munurin heldur verið 6.246 kr.

–Landsstýrið hevur givið fólkapensjónistum fleiri pengar, og hetta eru vit sjálvandi glaðir fyri, men tað, sum landsstýrið veruliga ger, er, at teir geva við aðrari hondin, men taka við hinari. Hetta verður ein skipan, sum ikki er haldbar í longdini, sigur Kristan Magnussen.

Hann heldur tað vera eitt gott stig, at grundupphæddin nú verður gjørd skattafrí, men vil ikki siga nakað um hetta stigið passar saman við teimum ætlanum og tonkum, sum Javnaðarflokkurin hevur gjørt sær í sambandi pensjónsviðurskiftini í framtíðini.

–Høvuðsendamálið eigur at vera, at pensjónin er til at liva av. Tað eru eitt rættiliga stórur partur av fólkapensjónistunum, sum ikki hevur nakra inntøku enn fólkapensjónina, og hesi eiga vit sjálvandi at tryggja, sigur Kristian Magnussen.

Hann heldur ikki nógv um tað arbeiðið, ið sitandi samgonga hevur gjørt á økinum hesa seinastu árini. –Tað er ikki komið eitt einasta røktarheim afturat hesi seinastu fýra árini, og landsstýrið hevur heldur ikki roynt at funnið eina breiða semju á pensjónsøkinum, sigur Kristian Magnussen.

Kristian Magnussen vil tó ikki siga, at Javnaðarflokkurin fer at atkvøða ímóti uppskotinum, tí so leingi tað er ein bati, so vil flokkurin taka undir við hesum.



*–Landsstýrið hevur givið fólkapensjónistum fleiri pengar, og hetta eru vit sjálvandi glaðir fyri, men tað, sum landsstýrið veruliga ger, er, at teir geva við aðrari hondin, men taka við hinari. Hetta verður ein skipan, sum ikki er haldbar í longdini, sigur Kristan Magnussen.*

## Finnleif Guttesen:

# –Missa 1,8 mió. av hækkaðu fólkapensjónini

**Borgarstjórin á Tvøroyri, Finnleif Guttesen, sigur, at ætlaða ábøturnar til fólkapensjónistar fara at kosta kommuni 1,8 mió kr. Hetta fer at ganga hart útyvir íløgurnar**

PENSJÓNIR
*Heri á Rógvi*

–Ætlanirnar hjá landsstýrinum koma at raka okkum rættiliga meint. Verða ætlaninar hjá landsstýrinum til veruleika, fer at hetta at gera, at vit ikki fara at hava ráð til nakrar stórvegis íløgur, sigur Finnleif Guttesen, borgarstjóri á Tvøroyri.

Á Tvøroyri eru umleið 300 fólkapensjónistar í løtuni. Hesir gjalda allir skatt til kommuna, og hesin kemur serliga inn ígjøgnum grundupphæddina, sum allir pensjónistar fáa.

Landsstýrið ætlar at gera tað soleiðis, at henda upphæddin verður gjørd skattafrí, soleiðis at fólkapensjónistar fáa meiri pening millum fingrarnar.

Finnleif Guttesen heldur uppskotið hjá landsstýrinum vera ógvuliga løgið, tá ið hugsað verður um, hvussu tað stendur til hjá kommunum sum eitt Tvøroyar kommunu.

–Vit hava vent okkum til Fíggjarmálastýrið, men hesir hava ikki kunnað svarað okkum, hvussu nógv ætlaðu broytingarnar fara at kosta okkum. Vit hava tó sjálvir gjørt nakrar útrokningar, sum siga okkum, at vit fara at missa 1,8 mió. hetta árið í mistari inntøku, sigur Finnleif Guttesen.

Hetta heldur borgarstjórin vera rættiliga álvarsamt, tá hugsað verður um, at kommunan hevur sett 2,5 mió av til íløgurnar hetta árið.

Finnleif Guttesen ætlar at taka málið upp í Kommunusamskipan Føroya. Hann heldur ikki, at kommunan vinnur pengarnar innaftur, soleiðis sum landsstýrið hevur havt hug at sipað til.

Finnleif Guttesen sigur tó, at hann er fegin um, at fólkapensjónistar fáa betri kor, tí hetta er nakað tiltrongt, men tað framgangsmátin, sum borgarstjórin hevur hug at kalla púrasta burturvið.



*–Vit hava vent okkum til Fíggjarmálastýrið, men hesir hava ikki kunnað svarað okkum, hvussu nógv ætlaðu broytingarnar fara at kosta okkum. Vit hava tó sjálvir gjørt nakrar útrokningar, sum siga okkum, at vit fara at missa 1,8 mió. hetta árið í mistari inntøku, sigur Finnleif Guttesen.*



# Broytingar ávirka øll

Beint áðrenn evstamark eydnaðist tað okkum at fáa hendur á Karsten Hansen, landsstýrismanni í fíggjarmálum. Hann sigur, at hann ikki metur, at tað fer at ganga so illa útyvir Tvøroyrar kommunu, sum kommunan sjálv vil vera við.

–Enn er eingin avgerð tikin um, hvussu býtið millum kommunur og landið verður í sambandi við broytingarnar í fólkapensjónini, men tað er givið, at allar broytingar fara at ávirka bæði land og kommunu, sigur Karsten Hansen.

Tvøroyar Kommunu hevur eisini fingið rættiliga fitt av stuðli í sambandi við landsvegagrunnin.

Hvussu býtið verður millum land og kommunu verður væntandi greitt í nærmastu framtíð, men landsstýrismaðurin vil ikki siga nakað, hvussu hann væntar, at úrslitið verður.

Karsten leggur dent á, at ætlaðu broytingarnar eru ein stórur bati fyri fólkapensjónistar. Serliga teir, sum eru ringast fyri fáa ágóðan av hesum.



# Sami sáttmáli sum seinast



*Jørgen Niclasen og Árni M. Mathiesen eru samdir um, at halda fiskiskapin á sama støði sum í fjør*
*Mynd: Jens K. Vang*

**Íslendski fiskimálaráðharrin og føroyski landstýrismaðurin við fiskivinnumálum samdust týsdagin um at lata fiskiveiðuna hjá londunum halda fram á sama støði sum í fjør. Hædd verður tó tikin fyri einum møguligum svartkjaftasáttmála seinni í ár. Eisini varð tosað um stórhvalaveiðu, sum íslendingar ætlar sær undir aftur**

SAMRÁÐINGAR
*Edvard Joensen*

Íslendingar og føroyingar fara at sleppa at fiska tað sama hjá hvørjum øðrum, sum vit gjørdu í fjør. Fiskimálaráðharrin og landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum eru nøgdir við avtaluna.

Men tað hoyrir við til avtaluna, at ein møgulig svartkjaftaavtala seinni í ár kann fara at gera broytingar í tí, sum nú er avtalað. Um eingin millumlanda avtala verður gjørd um svartkjaftin, eitt nú við kvota skipan, kann henda, at føroyingar og íslendingar av sínum eintingum seta sær sjálvum kvotu á svartkjaftin. Og so fer tað at ávirka veiðuna í mun til í fjør, tá vit veiddu frítt inni hjá hvørjum øðrum.

### Sama toskanøgd

Avtalan, sum gjørd varð týsdagin, ber í sær, at føroyingar aftur í ár sleppa at veiða 5.600 tons av botnfiski í íslendskum sjógvi. Av hesum kunnu 1.200 vera toskur. Umframt er ein kalvakvota upp á 80 tons, sum kann veiðast í tíðarskeiðnum 1. juni til 31. august.

Av uppisjóvarfiski sleppa føroyingar at veiða 30.000 tons av íslendskari lodnu eins og vit sleppa at fiska ta grønlendsku lodnukvotuna upp á 10.000 tons í íslendskum sjógvi.

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður, fegnast um, at kalvakvotan er við aftur í ár, tí íslendingar hava fyrr tosað um at taka hana av.

Eitt annað, sum landsstýrismaðurin fegnast um er, at føroyska toskakvotan er tann sama sum í fjør, hóast íslendingar hava gjørt av at minka teirra egnu toskakvotu úr 220.000 tonsum niður í 190.000 tons.

Í føroyskum sjógvi kunnu íslendingar umframt svartkjaftin eisini fiska 2.000 tons av heystgýtandi sild og 1.300 tons av makreli.

Í tíðindaskrivi, sum latið varð út eftir samráðingarfundin týsdagin, verður sagt, at partarnir samdust um, at grundað á væntandi broytingar í svartkjaftaveiðuni í íslendskum og/ella føroyskum sjóøki skal fiskiveiðiavtalan endurskoðast saman við øðrum fiskiveiðirættindum hjá pørtunum. Hendan endurskoðan skal verða framd innan 15. mars.

### Friðingar

Íslendski fiskimálaráðharrin hevði mánadagin fund við umboð fyri føroysku línuskipini, sum verða ávirkað av økisfriðingum undir Íslandi, og tí ikki hava fingið brúkt alla botnfiskakvotuna undir Íslandi í fjør.

Fiskimálaráðharrin segði seg hava lagt sær í geyma tað, føroyingarnir søgdu, og at hann nú fer at viðgera tað politiskt heima á Íslandi, tá hann kemur heimaftur.

Hann segði annars við Sosialin, tá hann kom til Føroya mánadagin, at íslendsku politikkur er at halda fram við og herða økisfriðingarnar. Tað endurtók hann eftir samráðingarfundin týsdagin.

Eisini onnur mál vóru á skránni á fundinum millum Jørgen Niclasen og Árna M. Mathiesen. Eitt nú um hvalaveiðu, har londini vilja samstarva til dømis í IWC.

Jørgen Niclasen segði eftir fundin, at føroyingar vilja fegnir sleppa undan donsku umboðanini í IWC og fáa egna umboðan, eins og vit hava í eitt nú NAFO NEAFC og slíkum felagsskapum.

Um íslendska hvalaveiðu segði Árni M. Mathiesen, at íslendingar hava smtykt at fara undir aftur stórhvalaveiðu, Í fyrsta lagi á vísindaligum støði. Men enn er eingin endalig tíðarfreist sett á, nær tað verður.

Føroyingar og íslendingar fara at virka fyri samstarvi um fylgissveinaeftirlit við fiskiflotanum í framtíðini, varð upplýst á tíðindafundi eftir samráðingarfundin týsdagin.

Um framtíðar fiskivinnupolitikkin hjá íslendingum segði Árni M. Mathiesen, fiskimálaráðharri, at arbeitt verður alla tíðina við at betra um kvotaskipanina, sum hann ikki tóktist hava hug at broyta grundleggjandi til eitt nú ta føroysku fiskidagaskipanina.

Várið 2002
Fermingartilboð
- út úr húsinum
Forrættir
· Fesk súpan við bollum, borðreidd við breyði
· Aspargessúpan, borðreidd við breyði
· Rækjubland við breyði og smøri
Høvuðsrættir
· Lambasteik við reyðkáli, agurkusalati, súltutoyi, hvítum eplum og sós av soðnum
· Lambasteik við rómabakaðum eplum, salati og sós av soðnum
· Heilstokt oksafilet við grønmeti, agurkusalati, hvítum eplum og sós av soðnum
· Heilstokt oksafilet við rómabakaðum eplum, salati og sós av soðnum.
· Fleskasteik við reyðkáli, agurkusalati, hvítum og brúnkaðum eplum og sós av soðnum
Omaná
· Trifli
· Fromasja: Appelsin, jarðber ella ananas
· Íslagkøka við vaflum
Út úr húsinum-prísir:
2 verðar 125,-
3 verðar 150,-
HOTEL
Tórshavnar Sjómansheim
TÓRSHAVN
★★★
Tórsgøta 4 • P.O. Box 97 • FO-110 Tórshavn
Tel +298 350 000 • Fax +298 350 001
e-mail: hotel@post.olivant.fo